


# Statoil nógv nýggj leitiloyvi í Bretlandi

Deil:

**Jan Müller**

13.11.2014 - 22:51

Oljan.fo

Norska oljufelagið Statoil, sum leingi hevur verið lokomotivið á føroyska landgrunninum, hevur nú av álvara tikið stig til at vera eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum á bretska landgrunninum. Tað vísir úrslitið av seinastu útbjóðingini á bretska landgrunninum, har Statoil hevur fingið 12 nýggj leitiloyvi. Felagið fekk øll tey loyvi tað søkti um, og við hesum er tað vorðin ein av teimum týðandi aktørunum í Bretlandi. Felagið fer at bora tveir brunnar í Bretlandi í 2015. Umboð fyri felagið sigur, at nýggju loyvini eru tekin um, at Statoil sær stórar møguleikar at gera fund í økjum á bretska partinum av Norðsjónum, har Statoil longu hevur gjørt stór oljufund og eisini í økjum, har oljufund ikki eru gjørd fyrr.


FAROES
UK
BRESSAY
MARINER
UKCS 28th Round Awards
Aberdeen